# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Tá vit vilja, so hava vit fult tamarhald á H71*

*Karl Johan Djurhuus, KÍF*

# Átta reyð sekund

**Útjavning, reytt kort, burturvísing og tap. Alt í átta sekund. Jú Áki Mørk gloymir neyvan seinastu sekundini av dystinum hjá Neistanum móti StÍF sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bara átta sekund fyri leiklok skeyt hann fyri fyrstu ferð í dystinum – byrjunarstøðan undantikin – Neistan upp á javnt, og rómurin í bláa partinum av høllini var øgiligur.

Men síðani gekk tað skjótt fyri seg. Tá StÍF gav bóltin upp, fekk hann reytt kort fyri at renna Jakob Jónsson umkoll, og fá sekund seinni varð hann burturvíst, tí hann var inni á vøllinum og mótmælti brotskastsdóminum, sum førdi til avgerandi málið. Eitt mótmæli, sum kostaði honum burturvísing frá dómaraparinum.

Tá vit seinni tosaðu við Áka, var hann skjótur av viðganga, at seinasti parturin kanska var betri ógjørdur, men hann hevði tó ilt við at skilja grundgevingarnar hjá dómaraparinum.

- Sjálvandi er fagnaðurin stórur, tá eg skori. Vit hava verið aftan fyri allan dystin, men við málinum koma vit upp á javnt. Tá bólturin so verður givin uppaftur, tackli eg Jakob alt fyri eitt. Sum eg sá tað, so var bólturin givin upp, og tá eigi eg ikki uttan víðari reytt kort fyri hetta. Tann parturin vildi verið øðrvísi, um bólturin als ikki var givin upp.

- Og dómarin sigur eisini við meg, at eg fái reytt, tí tacklingin er ov ógvuslig, og tað dugi eg als ikki at skilja.

### Var úti

Reyða kortið bar við sær, at Áki noyddist at flyta seg frá Neista-beinkinum, og ístaðin settist hann millum áskoðararnar.

- Tá er dysturin fyri mítt viðkomandi jú liðugur, og tí havi eg ilt við at skilja, at dómararnir vísa mær burtur seinni. Upptaktin til ta hendingina er annars, at eg leypi inn í gleði um bjargingina, sum Jacob ger. Tá eg so finni útav, at dómararnir hava dømt brotskast, standi eg longu inni á vøllinum, og tá pulsurin framvegis er høgur, beri eg meg ikki rætt at.

- Men sum eg havi skilt reglurnar, so kunnu teir ikki burturvísa mær fyri hetta. Vilja dómararnir hava ein áskoðara út, so mugu teir heita á hallarvørðin um hetta. Men í mínum føri geva teir krossaðar armar, so eg ivist í, um tann burturvísingin kann standa við, sigur Áki at enda.

Hvør revsingin verður, er ilt at meta um. Í øllum førum merkir reyða kortið, at Áki er leikbannaður, tá Neistin í komandi umfari spælir móti KÍF. Og so verður tað upp til Kappingarnevndina hjá HSF at gera av, um talan verður um aðra revsing.




*Bert sekundir eftir at hann hevði skotið Neistan upp á javnleik, mátti Áki Mørk fara av vøllinum við reyðum korti*

*Mynd: Álvur*

## Frágreiðing skal skrivast

Hjalmar Petersen, sum er fyrrverandi altjóða dómari, og sum eisini hevur virkað sum dómaraeygleiðario, var millum áskoðararnar til dystin á Skála sunnudagin. Og hann gevur Áka Mørk rætt, tá hesin metir tað vera skeivt av dómarunum at geva sær burturvísing, eftir at reyða kortið er givið.

- Tá reytt kort er givið, er spælarin úti úr dystinum, og tí er tað skeivt, at hesin seinni verður burturvístur.

- Hinvegin er eingin ivi um, at tilburðurin eigur at vera partur av frágreiðingini, sum dómararnir lata inn eftir dystin. Og tað skal so verða hendan frágreiðingin, sum er grundarlagið, tá støða skal takast til, hvørt spælarin skal leikbannast ella ikki, sigur Hjalmar Petersen.

**-mørk**

# Taptu tepurt fyri Wales

**Føroysku kvinnurnar taptu fyrsta dystin í undankappingini til EM-undankappingina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan gjørdist um tepurt tap, tá føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti spældi fyrsta dystin á ferðini til Makedonia.

Dysturin leygardagin var móti Wales, sum føroyska liðið áður hevur knógvað, men hesa ferð gjørdust okkara tó ov stuttar. Wales legði seg odda eftir góðum hálvum tíma, og tann støðan helt sær, til dysturin var at kalla liðugur. Tá øktu kvinnurnar úr bretska krúnveldinum, men í yvirtíðini eydnaðist Føroyum at minka um munin, tá Malena Josephsen sendi bóltin í netið.

Føroyar eru í undankappingini í bólki við Wales, Kasakhstan og Makedonia. Tað er bert vinnarin í bólkinum, sum sleppur víðari til veruligu undankappingina, og hetta tykist í løtuni at gerast ein dystur millum Wales og Kasakhstan. Kasakhstan vann nevnliga sín dyst móti makedonsku vertunum við einum máli móti ongum.

Næsti dysturin hjá føroysku kvinnunum verður mánadagin kl. 13, og er tað tá Kasakhstan, sum er mótstøðuliðið.